TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Barna- og ungdómsdeildin

Barna og ungdómsdeildin er ein nýsskipað deild undir trivnaðarfyrisit-ingini.

Barna- og ungdómsdeildin umsitir og hevur ábyrgd av 104 milliónum kr. av býráðsins fíggjarætlan 2006.

Í kommununi eru 35 dagstovnar, dagrøkt, tvær frítíðarstovur, 7 frítíðar-skúlar og ungdómshúsið, Margarinfabrikkin.

Tilsamans eru 1545 vøggustovu-barnagarðsbørn á dagstovnum, í dagrøktini eru 130 børn, í frítíðar-skúla 1. og 2. flokki eru 480 børn.

380 ársverk eru knýtt at stovnunum og gevur tað áleið 450 starvsfólk.

- leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

# Deildarleiðari til barna- og ungdómsdeildina

Í sambandi við bygnaðarbroytingar er eitt spennandi starv sum deildarleiðari til nýstovnaðu barna- og ungdómsdeildina leyst at søkja. Deildin kemur at taka sær av dagstovnunum, dagrøktini, frítíðar-skúlunum, ungdómshúsum og ráðgevingarstovuni (stuðul til børn við serligum tørvi). Deildarleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til trivnaðar-stjóran.

**Sum deildarleiðari hevur tú ábyrgdina av at:**
- leiða og menna økið, ið hoyrir til deildina
- verða við til at leggja framtíðarætlanir fyri økið við støði í barna- og ungdómspolitiska stevnumiðnum hjá býráðnum
- syrgja fyri at politiska og pedagogiska endamálið í dagstovnalógini verður fylgt.
- samskipa virksemi á økinum, m.a. skeiðvirksemi og ráðgeva leiðarum.
- gera fíggjarætlanir og hava fíggjarligt eftirlit soleiðis, at størst nytta fæst úr tilfeingi kommununar
- gera og seta í verk yvirskipaðar mannagondir

**Vit ynskja at tú:**
- hevur útbúgving frá hægri læristovni
- hevur leiðslu- og umsitingarligar royndir.
- hevur hug og hegni til at leiða, gongur á odda, er opin, mennandi, motiverandi og tekur initiativ, dugir at samskipa og er fyrikomandi
- dugir væl at fyrisita og samskifta bæði innan- og uttanhýsis og er til reiðar at taka avgerðir.
- dugir væl at málbera teg á føroyskum bæði í skrift og talu
- hevur góðan telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt sjálvstøðugt og áhugavert starv við nógvum avbjóðingum
- gott arbeiðsumhvørvi
- møguleika fyri eftirútbúgving

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður lønt ájavnt 35. lønarflokki í tænastastumannasátt-málanum umframt 15 % í eftirløn.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, (gunnleyg@torshavn.fo) ella Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóra, tlf. 30 20 10.

**Umsóknir**
saman við viðmælum og upplýsingum um úbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. januar 2006 kl. 12:00.
Viðmerk á umsóknina "deildarleiðari".

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Heimið fyri minnis-veik við Vallalíð

Á heiminum við Vallalíð eru 16 búpláss fyri minnisveik.

Heimið við Vallalíð er kommunalur stovnur undir trivnaðarfyrisitingini við rakstrarjáttan frá Almanna- og heilsumála-ráðnum sambært játtan á fíggjarløgtingslógini.

-leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

# Starvsfólk til Heimið fyri minnisveik á Vallalíð

Søkt verður eftir: Sjúkrarøktarfrøðingum svarandi til starvs-brøk 1,5 og Heilsurøktarum svarandi til starvsbrøk 1,5 til Heimið fyri minnisveik á Vallalíð at byrja 1. januar 2006 ella skjótast gjørligt.

**Vit bjóða**
Eitt spennandi og mennandi starv, har starvsfólkini luttaka í uppbyggjanini av einum heimi fyri 16 búfólkum sum eru minnisveik. Arbeitt verður útfrá einari sosialpsykologiskari tilgongd, sum er merkt av innliti, umsorgan, nærleika og virðing fyri tí einstaka menniskjanum.

**Søkt verður eftir fólki sum**
- Hevur hug og hegni at arbeiða við fólki ið eru minnisveik
- Er til reiðar at bróta uppúr nýggjum og ganga aðrar leiðir
- Vil verða við til at byggja upp eitt heim, sum er merkt av lívi og trivna
- Dugir væl at samstarva og samskifta við onnur
- Er motiverað og fleksibul
- Kann arbeiða í skiftandi vaktum

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett skjótast til ber og lønt eftir sáttmála við avvarðandi felag.

**Nærri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Idu Sørensen tlf. 302456 / 217339.

**Umsøkn**
við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal merkjast »Vallalíð« og verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi innan 30. desember 2005.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Heimið fyri minnis-veik við Vallalíð

Á heiminum við Vallalíð eru 16 búpláss fyri minnisveik.

Heimið við Vallalíð er kommunalur stovnur undir trivnaðarfyrisitingini við rakstrarjáttan frá Almanna- og heilsumála-ráðnum sambært játtan á fíggjarløgtingslógini.

-leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

# Reingerðarfólk til Heimið fyri minnisveik

Søkt verður eftir reingerðarfólki at arbeiða 20 tímar um vikuna til Heimið fyri minnisveik á Vallalíð.

**Vit søknast eftir fólki sum:**
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- dugir at samstarva og er fleksibul
- hevur hug og hegni at arbeiða við fólki ið eru minnisveik

**Setunarviðurskifti**
Starvi verður sett skjótast til ber og lønt eftir sáttmála við avvarðandi felag.

**Nærri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Idu Sørensen tlf. 302456 / 217339.

**Umsøkn**
møguligum viðmælum skal merkjast »Vallalíð« og verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi innan 30. desember 2005.


# Stongt

er frá og við fríggjadegnum 23. desember og latið verður uppaftur mánadagin 2. januar 2006 til vanliga tíð

Stuðulsstovnurin

Hoyvíksvegur 72 · Postsmoga 3279
FO-110 Tórshavn
telefon 356800 · faks 356801
t-postur: studul@studul.fo
heimasíða: www.studul.fo

Lesið internet Sosialin !



www. Sosialurin .fo